Bjóðar fólki í íbúðarneyð fyribils innivist

Í Igloo'unum hjá Kára Thomsen, arkitekti, oman fyri Kvívík, ber til hjá fólki í íbúðarneyð at fáa fyribils innivist

Um fólk ongastaðni hava at fara, ber til at leiga seg inn í smátturnar, sum standa oman fyri Kvívík

ÍBÚÐARNEYÐ
Eirikur Lindenskov

Kári Thomsen, arkitektur í Havn, sum eigur smátturnar, sum standa oman fyri Kvívík, hevur tikið til eftirtektar trupulleikarnar hjá teimum, sum einki stað hava at búgva í – serliga í Havn.

– Um fólk standa á gøtuni, so kunnu tey sleppa at búgva í smáttunum fyribils. Har eru góðar umstøður, allir hentleikur, enn tá vaskimaskina, sigur Kári Thomsen.

Hann sigur, at smátturnar vanliga verða leigaðar fremmandum ferðafólki, men enn er ikki so nógv trýst á.

– Um onkur ynskir at búgva her fyribils, so kunnu vit altíð tosa um tað, sigur hann.

Smátturnar eru ikki stórar, 27 fermetrar, men har er alt, og eitt lítið húski kann saktans klára seg har nakrar dagar, sigur Kári Thomsen.

Hann sigur, at fólk longu hava sett seg í samband við seg – og at hann fegin hýsir fólki, sum eru í neyð, um enn ikki fyri sama prís, sum ferðafólk gjalda – men tað kunnu vit altíð tosa um.

Tey, ið hava áhuga, kunnu ringja til Kára Thomsen á telefon 311319.

Kall og Postverkið samstarv um teldupost

KUNNINGARTØKNI
Eirikur Lindenskov

Nýggja telefelagið Kall og Postverk Føroya hava gjørt avtalu um samstarv um teldupost.

Avtalan millum Postverk Føroya og Kall hevur við sær, at kundar hjá Kall fáa teldubústað sín røktan av Postverki Føroya.

Í tíðindaskrivi, sum Bergur í Garði, postverksstjóri og Bjarni Askham Bjarnason, stóri í Kall hava undirskrivað, verður sagt, at Postverk Føroya hevur góðar royndir í at umsita posthús, bæði vanlig og teldutøk.

– Kallfelagar fáa nú boðið ókeypis teldupostbústaðir, sum liggja á posthúsinum Kall.net, sum Postverk Føroyar røkir. Avtalan, sum er gjørd, fær gildi frá 1. juni 2001, siga teir báðir.

Við hesum hevur Postverk Føroya eisini traðkað inn í fjarskiftisheimin, og Postverkið væntar, at samstarvið við Kall fer at hava við sær aðrar møguleikar fyri samstarvi, t. d. sølu av kalltænastum, umsitan av alnetshandilshúsum o. s. fr. verður sagt í tíðindaskrivi frá stjórunum báðum.

Tøkk

Vit takka øllum, ið sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá kæra móðir okkara

Lovisa Nielsen

varð sjúk, doyði og varð jarðað

Tøkk til Ellisheimið fyri tíðina har.
Tøkk til bilførarar og onnur, ið steðgaðu á og sýndu virðing á tann hátt.

Gunvør, Øssur, Olaf, Rodmundur

Bryggjudansur í Vágsbotni í kvøld

Bátafelagið í Havn skipar í kvøld fyri »dans på brygga« framman fyri felagshølunum undir Bryggjubakka

DANSUR Á BRYGGJUNI
Eirikur Lindenskov

Nú næturnar eru styttur burtur í nærum einki, fer Bátafelagið í Havn aftur at skipa fyri dansitiltakinum, »Dans på bryggen«, har til ber hjá fólki í øllum aldir at fáa sær ein svingom á bryggjuni í Vágsbotni í Havn.

Tiltakið byrjar í kvøld, leygarkvøldið, klokkan 21, og verður dansurin bæði góður og fjølbroyttur, siga fyrireikararnir. Tað verða Jentoft og vinmenn,s um fara at spæla, og Tøkum Lætt skipar nakrar lættar vísur og kanska okkurt kvæði.

Men ikki nóg mikið við tí.

– Hóast vit fara at brúka nogva orku til at sveima runt dansigólvið, so nýtist ongum at óttast fyri maktarloys. Tí umborð á Tinganesi, sum liggur beint undir bátafelagshúsinum, verður møguleiki at keypa sær vælsmakkandi búffar at styrkja seg við, siga fyrireikararnir.

Eisini fæst kaffi, te, sodavatn, vaflur o. a. til matna.

Umframt tað verður møguleiki at vinna eina ferð fyri tvey til Bergen og aftur.

Í fjør vóru ávísir trupulleikar við toilettviðurskiftunum, men í ár nýtist ongum at stýra fyri tí – nú verða tey viðurskiftini í lagi.

So um veðrið er gott, og fólk í góðum dansihýri, so verður »dansurin á bryggjuni« hesaferð sum seinast: Avbera hugnaligur og skemtiligur, siga fyrireikararnir.

Dansurin gekk so lystiliga til dansitiltakið í fjør, og vóna fyrireikararnir at hetta endurtaka fer at endurtaka sig